

*Hóast teir ikki verða meistarar sjálvir, so fer EB/Streymur helst at hava ein týðandi leiklut, tá FM skal plaserast. EB/Streymur - sum enn ikki hevur tapt heima - fær nevnliga vitjan av bæði Skála og B36 í seinastu umførunum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Tað liggur til høgra beinið hjá høvuðsstaðnum

**Sunnudagin er neyðugt at fáa fult hjá Skála, sum fer at fáa vitjan av HB, ið leikliga hevur kós rætta vegin, meðan tað nú skal vísa seg hjá Skála, um teir megna at standa seg, hóast skaðar eru farnir at gera um seg**

**22. UMFAR SAMANUM**

*Jóannes Hansen*

Landskappingin setir met, hvørja ferð tað verður spælt. Undanfarin ár hevur eingin kapping verið í meiri enn átjan umfør. Sunnudagin var 22. umfar á skránni, og longu í annaðkvøld verður sjøtul settur á 23. umfarið. Tá skal VB spæla í Klaksvík. Sambært skipanini skuldi dysturin verið í Vági sunnudagin. Hann verður í Klaksvík, tí KÍ var í Vági á Jóansøku, og hann verður hóskvøldið, tí VB í vikuskiftinum skal til Íslands at spæla móti vinarfelagi.

Vágbingar og klaksvíkingar hava tað til felags, at teir sunnudagin fingu eitt stig burturúr, og teir hava tað til felags, at hvørki liðið á nakran hátt kann siga seg at vera leyst av niðurflytingar vandanum. Um tað eydnast øðrum liðnum at fáa fult í morgin, so fer myndin at síggja minni svørt út, enn hon higartil hevur gjørt. Hvussu nógv bjartari hon verður, fer sjálvandi eisini at valdast um, hvussu tað fer at hilnast hjá hinum botnliðunum, tá ið tey í vikuskiftinum skulu í eldin.

ÍF eigur torføra uppgávu í Gundadali móti B36, TB eigur torføra uppgávu á Eiði, og GÍ eigur torføra uppgávu, tá ið teir fara at fáa vitjan av NSÍ. Um mett verður út frá avrikunum seinastu ferðirnar, so tykist avbjóðingin hjá GÍ at vera eitt vet lættari, enn hon verður hjá TB og ÍF, men tað plagar altíð at vera sera tætt, tá ið liðini báðu megin Gøtueið dystast.

TB tapti tepurt á heimavølli fyri B36, og nú skal nógv til, áðrenn TB verður leyst av aftasta plássinum og harvið beinleiðis niðurflytingini. Tað eru fimm umfør eftir, og um tað skal eydnast TB at sleppa av aftasta plássinum, so er neyðugt hjá teimum at fáa fult í tveimum umførum, uttan at næstu kappingarneytarnir fáa nakað burturúr.

## Skála stríðist við høvuðsstaðin

Sunnudagin misti oddaliðið Skála tvey stig í kapprenningini við høvuðsstaðin. Eftir tvær meiri enn hálvt miseydnaðar royndir eydnaðist tað B36 at fáa fult móti TB, og hóast teir skinklaðu eina lítla løtu, so var heimasigurin hjá HB móti GÍ rættuliga sannførandi.

Skálamenn roknaðu uppgávuna í Klaksvík at vera stóra avbjóðing. Tað endaði málleyst, og hóast teir á Skála tóktust eitt sindur vónbrotnir, so var úrslitið kanska at liva við. Tað valdast um, hvussu tað næstu ferðirnar fer at hilnast hjá oddaliðnum.

Skála misti sunnudagin málverjan. Vlad Filipovic sleit hælsinuna í Klaksvík. Á sama vøllinum spældi hann 17. apríl fyri fyrstu ferð við Skála. Í tí uppgerðini fekk hann ein løst, sum leingi darvaði honum. Hann kom fyri seg aftur, og Vlad hevur verið Skála sera stinnur.

Nú er spurningurin, hvussu tað fer at hilnast hjá Skála, tá ið fyrsta valið millum stólparnar er burtur. Fyrsta og sera týdningarmikla svarið fer at fáast sunnudagin, tá ið HB fer at vitja á Skála.

HB spældi størsta partin av tíðini móti GÍ væl betri, enn teir hava gjørt higartil í ár. Julian Hansen tykist arbeiða við at endurskapa fótbóltsmentanina og harvið at pilka sparkaríið úr meistaraliðnum.

Higartil í ár hevur HB staðið seg væl betri í Gundadali, enn teir hava gjørt á útivølli. HB eigur tveir útidystir eftir - umframt á Skála skulu teir spæla í Fuglafirði - og tað verða kanska serliga úrslitini í Eysturoy, sum fara at gera av, hvussu HB møguleikarnir fyri at vinna fjórða FM heitið á rað fara at verða.

Úrslitini sunnudagin bóru við sær, at trý tey fremstu feløgini nú øll hava í sínum hondum at gera av, um tey skulu vinna FM. Tvær innanhýsis toppuppgerðir eru eftir. Skála og HB skulu spæla sunnudagin, og í síðsta umfarinum bresta B36 og HB saman. Um Skála ikki stendur royndina, nú teir eru so tætt at fyrsta meistaraheitinum, og nú teir hava mist týdningarmikla málverjan, so verða tað havnarfeløgini, sum enn eina ferð fara at kappast um FM heitið. Tað hava havnarfeløgini vunnið fýra tey seinastu árini.

## Eiga besta undirhaldið

NSÍ hevur so mangan verið á veg móti heiðursmerkjum, uttan at tað hevur eydnast at fingið fatur á teimum. Sunnudagin taptu teir 5-2 á heimavølli móti EB/Streymi, og tað kendist meint. Bæði tí munurin fram til triðja plássið longdist og eisini tí, at teir mistu tvey mála leiðslu, og at avrikið staðfesti, at NSÍ í løtuni hevur stórar trupulleikar í verjupartinum.

EB/Streymur hevur longri veg til heiðursmerkini, enn vegurin hjá NSÍ er. Men avrikini seinastu ferðirnar hava víst, at samansetta liðið kanska er tað, sum er best fyri av øllum í løtuni. Teir hava móti KÍ, HB og NSÍ skorað trettan mál, og tað tykist vera tungt at steðga teimum.

Spurningurin er so, um EB/Streymur framvegis fer at hava stóran leiklut í kappingini um meistaraskapin. Tað fara at teir at hava, um tað eydnast teimum at taka stig frá B36 og Skála. Bæði oddaliðini skulu spæla á Mølini. B36 í fjórði síðsta umfarinum og Skála í næstsíðsta umfarinum.

Um Skála sunnudagin fer at fáa fult móti HB, so fara teir í kappingini við meistaraliðið at tola at tapa á Eiði, og um Skála einki fer at fáa burturúr á Eiði, so kunnu teir sjálvandi eisini vóna, at tað heldur ikki fer at eydnast B36 at fáa nakað við av Mølini.

Men tað er neyvan við rokning upp á, hvussu tað við fáum tapum skal bera til at vinna FM, at oddaliðini leggja ætlanir fyri endaspurtin, sum tykist skula gerast ógvuliga tættur og spennandi. Uppskriftin er heldur at vinna meiri enn mótstøðuliðini megna.

Skráin er væl skrúvað saman í ár. Í fimm teimum síðstu umførunum eru fleiri rættuliga spennandi dystir, har fremstu liðini av álvara skulu spíla seg út. Tann fyrsti av hesum slagnum verður sunnudagin, tá ið Skála í ársins dysti higartil fer at fáa vitjan av HB. Um Skála fer at fáa fult, so fara teir at verða torførir at halda burtur frá fyrsta FM heitinum. Um HB fer at vinna, so verður talan ivaleyst um FM uppgerð millum feløgini í høvuðsstaðnum. Tað er nú, at Skála rættuliga skal standa sína roynd!